## Nógv mistøk á sjúkrahúsum

Í Danmark vísir ein kanning, at yvirhøvur eru fólk væl nøgd við viðgerðina á landsins sjúkrahúsum, men samstundis vísir tað seg, at næstan 20 prosent av sjúklingunum hava fingið skeiva viðgerð, meðan tey hava ligið har.

Fimm prosent av teimum spurdu siga, at tey fingu skeivan heilivág, meðan tey vóru á sjúkrahúsi. Sjey prosent siga, at tey fingu mein í sambandi við skurðviðgerð, og tólv prosent siga seg hava fingið »annan skaða«, skrivar Politiken. Viðurskiftini eru eitt sindur ymisk frá einum sjúkrahúsi til annað, men Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn sleppur best burtur úr kanningini.

Tey spurdu eru á einum máli um, at tað tekur ov langa tíð at bíða eftir viðgerð á teimum donsku sjúkrahúsunum. Tey kæra seg eisini um, at tey noyddust at bíða leingi eftir at sleppa til kanningar.

## USA hóttir ES

Fleiri leiðandi limir í amerikonsku Kongressini hótta nú við, at USA fer at revsa ES, um ES-londini gera av at seta vápnahandilsbannið ímóti Kina úr gildi, soleiðis sum ES ætlar.

Tá George W. Bush, forseti, var í Evropa í síðstu viku, ávaraði hann teir evropeisku leiðararnar ímóti at ógilda vápnahandilsbannið, sum hevur verið í gildi síðani tilburðin á himmalska friðartorginum í Beijing í 1989. Men fleiri ES-leiðarar, teirra millum Gerhard Schrøder, kanslari, og Jacques Chirac, forseti, gjørdu amerikanska forsetanum greitt, at bannið verður sett úr gildi, og at tað helst verður gjørt í juni, skrivar Reuter.

Fyrradagin hevði Bush fund við fleiri leiðandi limir í Kongressini, og har hóttu teir við at revsa ES, verður vápnahandilsbannið sett úr gildi. Nevnt varð, at so sleppa tey evropeisku londini ikki at keypa hátøkniliga vápnaútgerð úr USA.

## Franskt nei nærkast

Fyrr í vikuni samtykti franska tjóðartingið við stórum meiriluta nakrar broytingar í fronsku grundlógini, tí tær eru neyðugar, fyri at landið kann staðfesta ta komandi ES-grundlógina.

Men tað er als ikki vist, at franska stjórnin sleppur at staðfesta ES-grundlógina, tí franska fólkið skal taka støðu til spurningin fyrst. Í januar vísti ein meiningakanning, at 63 prosent av veljarunum ætlaðu sær at atkvøða fyri ES-grundlógini, men nú vísir ein nýggj kanning, at undirtøkan er minkað niður í 58 prosent. Hetta hevur fingið fransmenn at minnast fólkaatkvøðuna um Maastricht-sáttmálan í 1992. Tá var stórur meiriluri fyri sáttmálanum, men tá fólkaatkvøðan kom, vóru bara nakrar túsund atkvøður í meiriluta fyri sáttmálanum.

Kanningar vísa, at nógvir fransmenn halda, at Frakland fer at missa sína ávirkan í ES, kemur tann nýggja grundlógin í gildi, og aðrir halda, at hon verður ein meinbogi fyri ta sosialu skipanina í Fraklandi.

## Frá HP til Heimsbankan

Síðani Heimsbankin varð stovnaður aftan á seinna heimsbardaga, hevur hann altíð havt amerikanskan stjóra. Seinastu tíggju árini hevur James D. Wolfersohn verið stjóri, men hann skal frá um stutta tíð fyri aldur, og so er spurningurin, hvør skal taka við.

Tað fyrsta uppskotið hjá Bush-stjórnini var Robert B. Zoellick, sum hevur verið samráðingarleiðari í heimshandilsfelagsskapinum WTO, men hann hevur júst fingið nýtt starv í uttanríkisráðnum. So varð tosað um at lata varaverjumálaráðharran Paul D. Wolfowitz fáa starvið, men hann er ikki væl lýddur í Evropa, sum heldur hann vera høvuðsmannin aftan fyri amerikonsku innrásina í Irak.

Tað seinasta amerikanska uppskotið er Carly Fiorina, sum herfyri noyddist úr stjórastarvinum í stóru teldufyritøkuni Hewlwtt-Packard orsakað av ósemju við nevndina. Hon ber orð fyri at vera sera gløgg og er sera nógv avhildin í amerikanska vinnulívinum.

### UTTAN ÚR HEIMI

# Fekk lina revsing



*Tann víðgongdi muslimski presturin Abu Bakar Bashir fekk í gjár hálvt triðja ára fongsul fyri at hava skipað fyri bumbuatsóknini á frítíðaroynni Bali á heysti í 2002. Atsóknin kravdi 202 mannalív, og fleiri lond hava mótmælt, at presturin fekk so lina revsing. Sjálvur tóktist hann eisini vera væl nøgdur, tá hann bleiv leiddur út úr rættarhølinum aftan á dómin.*

# Fleiri hundrað horvin sum døgg fyri sól

**Fleiri hundrað mótstøðufólk hjá stýrinum í Nepal eru horvin sum døgg fyri sól. Mannarættindafelags skapir ivast ikki í, at tað er herurin, sum hevur beint fyri teimum**

NEPAL
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanski mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch kravdi í gjár, at nepalski kongurin og herur hansara gevast við at beina mótstøðufólk av vegnum, og at teir, sum hava staðið fyri burturbeiningunum, verða revsaðir.

HRW sigur í einari nýggjari frágreiðing um viðurskiftini í Nepal, at undir borgarakrígnum við maoistiskar uppreistrarmenn tey seinastu níggju árini hevur stjórnarherurin tikið minst 1200 mótstøðufólk, sum ikki eru komin afturíaftur. Teir flestu tilburðirnir eru frá 2003 og 2004.

Tann 1. februar koyrdi Gyanendra kongur stjórnina og tjóðartingið til hús, og síðani hevur hann stýrt landinum einsamallur við hjálp frá herinum. Human Rights Watch sigur, at tá havt verður í huga, hvat nepalski stjórnarherurin hevur gjørt seg sekan í, er tað ræðandi, at hann nú stýrir landinum saman við konginum.

– Tað er rætt, at teir maoistisku uppreistrarmenninir eru sekir í bæði morðum, pníng og hóttanum, men tað er eingin umbering fyri at lata herin sleppa at gera, sum honum lystir, sigur Brad Adams, sum er leiðari á asiatisku deildini hjá Human Rights Watch, við Reuter.

HRW sigur seg hava prógv fyri, at fleiri politisk mótstøðufólk í Nepal hava verið horvin í fleiri ár, og at tað er lítið sannlíkt, at tey eru á lívi longur.

# Tí køld var náttin

**Tað hevur verið ógvuliga kalt nógvastaðni í Evropa hesa vikuna, og nógvastaðni hevur kuldin sett met**

VEÐRIÐ
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Har suðuri í Týsklandi vita fólk ikki at siga um so nógvan kulda sum teir seinastu dagarnar. Í býnum Albstadt-Degerfeld í Bayern vóru 36,1 kuldastig týsdagin, og á flogvøllinum í München stóðu mátararnir á 25,1 kuldastigum mikudagin, og so nógvan kulda hava tey ikki havt har síðani í 1942, skrivar DPA. Í München hevur kavin ligið síðani fyrst í februar, og tað er ikki hent seinastu 25 árini.

Í Eysturríki er líka kalt. Í Oferpass vóru 32,1 kuldastig týsnáttina, og teir fyrstu dagarnir í mars vóru teir kaldastu í 30 ár.

Eisini norðmenn læra seg um nógvan kulda, og mikunáttin var serliga køld. Í Drevsjø í Hedemark vóru 37,2 kuldastig, og í Røros komu mátararnir heilt niður á 38,8 kuldastig, skrivar NTB. Norska veðurstovan sigur, at mikunáttina var hitin niðan fyrii frostmarkið um alt landið, og at tað er sjáldsamt.